SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Juni, 2014

## BUNKRING: Mannagongdir fyri skip, sum bunkra í Føroyum

Tá ið skip hava verið fyri eftirliti í fremmandari havn (PSC) hava vit stundum sæð, at føroyskir veitarar hava ikki havt nøktandi mannagongdir fyri uppfylgjandi arbeiði við skjølum aftaná bunkring.

Endurtakandi feilir í skjølum kunnu hava neiligar avleiðingar við sær fyri skip og rakstrarfelag. Eftir at skip hava fingið slíkar viðmerkingar í fremmandum havnum hevur felag her heima tikið stig til at bøta um hesa støðuna.

Semja er nú gjørd við Magn um, at henda mnnagongd skal vera galdandi í sambandi við bunkring av skipum, ið sigla úr føroyskum sjógvi.

- Øll bílegging til Magn skal sendast í telduposti.
- Á bíleggingini skal kunnast um:
  - Navn á skipi,
  - IMO nr.,
  - Bunkringarstaður
  - Nøgd av olju og hvar farið verður farið aftaná bunkring (destination)
- Magn letur skipinum við hvørja bunkring seinast galdandi Certificate of Quality (CoQ). Hetta kann eisini sendast sum teldupostur, men best er, um hetta verður latið skipara ella maskinmeistara á staðnum.
- Magn fyllir út og letur skipinum eina Bunkers Delivery Note (BDN). Hon skal umfata vanligar upplýsingar um bunkringina, sum
  - MARPOL-leiðreglurnar fyriskrivað, herundir nummarið á CoQ
  - Næsta havn (destination)
  - Vektfylla,
  - Litratal,
  - Nøgd í metric tons,
  - umframt upplýsingar um skipið.
- BDN-skjalið skal undirskrivast av bæði veitara og skipi.
- **Gevið gætur:** Oljuroynd skal latast skipinum við hvørja bunkring, og skal á fløskuni standa skrivað, dato, staður og nummarið á CoQ.

Sjóvinnustýrið fer at heita á øll føroysk skip, sum bunkra í Føroyum um at tryggja sær, at henda mannagongd verður fylgt, so at sleppast kann undan viðmerkingum um hesi viðurskifti, tá ið skipið er fyri eftirliti í fremmandari havn.

--- 00 ---